# Semju millum Akademikarafelagið og Fíggjarmálaráðið

**1.** Sattmálaskeið og lønarhækkingar

Verandi sáttmáli verður endurnýggjaður frá 1. oktober í 2017 til 1. oktober 2019.

- Tann 1. oktober í 2017 hækkar mánaðarlønin 2,3%
- Tann 1. oktober í 2018 hækkar mánaðarlønin 2,5%

**2.** § 7 um barnsferð verður orðað soleiðis:

Starvsfólk, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing.
Stk. 2. Starvsfólk hevur rætt til barsilsfarloyvi við løn 4 vikur undan mettari føðing og í 24 vikur eftir føðing, t.e. 28 vikur tilsamans.
Stk. 3. Prógvar starvsfólkið við læknaváttan, at hon er óarbeiðsfør 4 vikur ella fyrr undan mettari føðing, verður hetta roknað sum vanlig sjúka, og starvsfólkið hevur tá rætt til løn undir sjúku. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, verður farið frá løn undir sjúku til barsilsfarloyvi við løn, sbr. stk. 2. Samlaða barsilsfarloyvi við løn er farmvegis 28 vikur.
Stk. 4. Umframt nevndu sømdir kann starvsfólk fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, um hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.
Stk. 5. Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín.
Stk. 6. Starvsfólk, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið, og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til fráveru við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í samband við, at tey fáa barnið. Foreldrini kunnu ikki vera í farloyvi við løn samstundis eftir hesi grein.
Stk. 7. Umframt farloyvi nevnt í stk. 2-6, hava starvsfólk rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur soleiðis, at samlaða farloyvistíðarskeiðið tilsamans er 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið. Tíðarskeiðini eru samanhangandi, og farloyvi eftir hesi grein skal vera avgreitt í seinasta lagi 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið.
Henda grein fær gildi frá í dag og er eisini galdandi fyri tær barnakonur, sum eru í barsilsfarloyvi við løn frá arbeiðsgevara.

**3.** § 9 Eftirsitiløn verður orðað soleiðis:

Tá ið starvsfólk doyr í tænastutíðini, eiga hjúnafelagi/samlivari ella børn undir 21 ár, sum tað uppiheldur, rætt til løn samsvarandi uppsagnartíðini, minst 3 mánaðir, tó hægst 6 mánaðir. Eftirsitilønin er seinast útgoldna mánaðarlønin. Lønin í mánaðinum, tá ið starvsfólkið doyr, verður ikki roknað upp í eftirsitilønina.

**5.** Protokollat um meting av útbúgvingum:

Partarnir eru samdir um, at tørvur er á einari skipan til meting og innskipan av útbúgvingum í mun til sáttmálan. Eftir tørvi kunnu partarnir heita á Mentamálaráðið og Fróðskaparsetur Føroya at vera við í hesum arbeiði, saman við sáttmálapørtunum.
Miðja verður eftir at hava eina loysn innan 1. januar í 2019.

Tórshavn 23. mars 2018

| *Akademikarafelag Føroya* | *Fíggjarmálaráðið* |
| --- | --- |